# Lagið er gott og bjartskygni ræður í »myrkrinum« í Leirvík

**Hósdagin var Sosialurin á áhugaverdari og hugtakandi vitjan inni í tunlinum, sum um hálvt triðja ár fer at knýta Eysturoynna og Norðoyggjar saman.**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Maðurin í borivogninum. Borarnir eru teldustýrdir og "vita" sjálvir, hvar og hvussu teir skulu seta á*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Veðrið var gott í Leirvík hósdagin, og tað var lagið á teimum, vit prátaðu við, eisini. Málið var at síggja, hvussu gongur við tunnilsgerðini millum Eysturoynna og Norðoyggjar.

Á ferðini skiltist skjótt, at optimisman um verkætlanina er stór, lagið er gott, og menn stríðast 22 tímar um samdøgrið við at bróta seg ígjøgnum harða basaltið. Og hart skal tað vera, um tað skal vera gott. Benið sunnanfyri bygdina í Leirvík, har tunnilin byrjar, var heldur vánaligt at síggja til, tá ið fyrrverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, skjeyt fyrsta skotið.

Men longu nú síggjast stórir batar. Nú komið er stívliga 100 metrar inn í fjallið, er tilfarið gott, og hetta samsvarar væl við tær kanningar, sum gjørdar eru. Tey, ið standa aftanfyri hesa verkætlan, bæði sum arbeiðstakarar og byggiharri, tykjast sannførd um, at útlitini fyri einum góðum tunli undir Leirvíksfirði eru minst líka so bjørt, sum útilitini vóru, tá ið farið varð undir tunnilin undir Vestmannasundi.

## Blíðskapur

Tá ið vit komu til byggiplássið í Leirvík, hittu vit norðmannin, Alf Helge, sum er byggileiðari vegna arbeiðstakaran, Føroya Konsortiið. Konsortiið er eitt felag, sum er skrásett og rindar skatt í Føroyum og tey, ið mynda felagið, er NCC, J & K Petersen og Byggitek. Byggiharrin aftan fyri hesa stóru verkætlan er P/F Norðoyatunnilin.

Alf, sum fyrstu ferð kom til Føroya at arbeiða, 1. desember í fjør, var bæði blíður og fyrikomandi og helt, at løtan, vit vóru komnir til Leirvíkar, júst var hin rætta. Tunnilin var ruddaður eftir seinastu spreinging, og stóri borivognurin var í ferð við at bora nýggj hol til næstu spreinging.

Meðan vit prátaðu og riggaðu okkum til at fara oman í tunnilin, kom Sigurd Lamhauge inn á gólvið í hølunum, sum sett eru upp til skrivstovuhald og annað. Sigurd, sum í sínari tíð framdi eitt av størstu ítróttarligu bragdunum í Føroya søgu, er í dag projektleiðari fyri byggiharran.

Tá ið vit báðir, myndamaðurin og eg, høvdu funnið okkum hjálmar og stivlar, fór annar í jeepin hjá Sigurdi og hin í jeepin hjá Alf.



*Alf Helge er byggileiðari fyri Føroyska Konsortiið, sum byggir tunnilin, og Sigurd Lamhauge er projektleiðari fyri byggiharran, P/F Norðoyatunnilin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Nógvur larmur

Lítið fólk var í tunlinum hesa løtu, men larmurin frá borivogninum var so nógvur, at ikki hoyrdist mannamál niðri við snøgga benið. Meðan vit stóðu har niðri í holinum, varð roynt at spyrja um okkurt, men hetta var líka so væl ógjørt. Roynt var í staðin at hefta seg við tað, sum eyguni sóu, og sigast má, at hetta var ein hugtakandi løta.

Í fyrsta lagi var hon hugtakandi, tí hetta eru somu amboð og sami háttur, sum nýttur varð, tá ið tunnilin undir Vestmannasundi varð bygdur. Hjá einum, sum bert hevur koyrt ígjøgnum hendan tunnilin, nú hann er liðugur, er lítið, sum kann geva tær eina ábending um, hvussu hetta megnararbeiði, ið hevur verið nevnt "ein drønandi succes", er fingið frá hondini.

Men standandi niðri í botninum á tunlinum, sum um hálvt triðja ár verður farleiðin millum Eysturoy og Norðoyggjar, fært tú eina kenslu av, hvussu slíkt arbeiði gongur fyri seg.

Tann, sum heldur, at ein hópur av fólki gongur inni í sjálvum tunlinum, meðan borað verður, mistekur seg.

## Tveir mans

Uppi í stóra borivogninum, sum borar við trimum borum í senn, situr ein maður og ansar eftir, at alt riggar og gongur, sum tað skal. Men hann hevur eftir øllum at døma ikki so nógv at gera. Í hvussu er, stýrir hann ikki borunum manuelt. Teir eru teldustýrdir og "vita" sjálvir, hvar og hvussu teir skulu seta á. Uppi á sama borivogni, sum er mest líkur eini stórari gravkúgv, er ein stórur armur við einum "kassa" í endanum. Uppi í kassanum stendur ein maður, sum hevur til uppgávu eftir hvørja spreinging at syrgja fyri, at loftið ikki er leyst. Borivognurin borar hol uppí loftið, og síðan festir maðurin stengur uppí holdið. Fyrst verður ein sonevnd límpatrón stungin uppí holið, og tá ið stongin verður bukað uppí patrónina og malin runt, skrædnar límpatrónin, og stongin verður rimmarføst. Síðan verður ein "skál" sett uppá stongina og uppundir loftið, og ein møttrikur skrúvaður uppundir

Ymiskt er, hvussu nógvir stengur verða festar undir loftinum eftir hvørja spreinging, men talið liggur um 15. Men er loftið heilt – uttan rivur og leyst grót, slepst stundum undan at gera hesi festi.

Hesa løtuna, vit vitjaðu inni í tunlinum, vóru bert tveir mans til arbeiðis – tann, sum sat í borivogninum og so maðurin, sum festi stengurnar uppundir loftið.

Aftan fyri borivognin, stóð ein minni lastbilur, sum eitt nú flytir spreingievni inn í tunilin.

Hugtakandi var at síggja, hvussu nógv tveir mans soleiðis kunnu útrætta við røttu amboðunum.




*Tann stóri borivognurin hevur tríggjar borar. Tað tekur umleið hálvan tíma at bora holið 5 metrar inn í benið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## 110 hol

Norðmaðurin, Alf, visti at siga, at hesin borivognurin er hin sami, sum nýttur varð til boringina undir Vestmannasundi.

Og tað er ikki á hvørjum degi, at slík amboð verða keypt, tí ein slíkur vognur kostar ikki minni enn 7-8 miljónir krónur!

Áðrenn sprongt verður, verða eini 110 hol boraði einar fimm metrar inn í bergið, og hvørja ferð verður teinurin til Norðoyggjar umleið 4,75 metrar styttri. Tað tekur borivogninum umleið ein hálvan tíma at bora hvørji trý hol.

Sprongt verður 2-3 ferðir um samdøgnið, og fyllan av gróti hvørja ferð er eini 500 rúmmetrar – ella uppí einar 60 lastbilar!

Løtt verður soleiðis, at tað tekur eini 8 sekundir, áðrenn hvør spreinging er av. Tað merkir, at allar løðingarnar bresta ikki samstundis.

Alf segði, at enn eru teir ikki komnir undir vatnskorpuna, men teir eru niðri ímóti vatnlinjuni. Tá ið tunnilin er vorðin einar 800 metrar longri, eru teir komnir undir Leirvíksfjørð.

Hann er væl nøgdur við grótslagið, og teir eru lítið plágaðir av vatni.

## Betri umstøður

Sigurd Lamhauge, projektleiðari, sigur, at so hvørt komið verður einar 500-600 metrar longur fram, verða allar instalatiónir lagdar, og breytin verður asfalterað. Mett verður, at hetta fer at gera arbeiðsumstøðurnar lættari og betri, ikki minst hjá teimum, sum skulu koyra grótið út úr tunlinum.

Sosialurin fer at venda aftur til tunnilsarbeiðið í komandi blaði.



*Myndin er tikin úr tunlinum og út í ta kláru luftina, sum var hósdagin, tá ið Sosialurin vitjaði í Leirvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*Fyritøkan, JKH í Rytuvík, hevur havt timburmenn í Leirvík seinastu mánaðirnar, sum hava smíðað fyri arbeiðstakararnar og byggiharran*

*Mynd: Jens Kr. Vang*